Djóralækni um innflytingarlógina:

# Ólógligir hundar í Føroyum



**– Hóast hundurin er ektaður Pittbull terriari ella Tosa, so ber altíð til at siga, at eingin stamtalva fylgir við hundinum. Tá ber jú ikki til at prógva at hann er av bannaðu sløgunum, hóast hann líkist teimum, sigur Lars Mohr Nielsen, djóralækni**

HUNDAR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Lars Mohr Nielsen er djóralækni í Havn. Hann hevur hugt eitt sindur at lógini um innflyting av djórum til landið, og hann heldur, at lógin er rættiliga elastisk.

– Hóast tú ikki hevur loyvi at innflyta Pittbull Terriarar ella Tosa, so kanst tú altíð blanda tvey sløg, tí so hevur tú ikki ein ektaðan hund longur. Tá er tað ein blandhundur uttan stamtalvu, men hann kann framvegis vera vandamikil, vísir Lars Mohr Nielsen á.

Hann sigur víðari, at ein annar møguleiki er at lata pappírini uppá ektaða hundin liggja eftir, tá hann verður innfluttur.

– Um tað ikki ber til at prógva, at talan er um ein av bannaðu hundunum, hvør kann so taka dagar ímillum um tað er so ella ikki? Hóast hundurin líkist einum av bannaðu hundunum, so kann altíð førast fram, at talan er um eitt sonevnd »gatukryds«, sum ikki hevur nøkur pappír, sum vísa racuna, vísir djóralæknin á.

Lógin sigur, at tað ikki er loyvt at innflyta blandingar av bannaðu hundaløgunum til landið, men tað kann vera ilt at meta um blandingina, tá stamtalva ikki fylgir við hundinum.

### Kamphundar

Spurdur hvørji hundasløg koma undir kamphundar, svarar Lars Mohr Nielsen, at tað serliga eru trý sløg av hundum. Pitbull terrier, Tosa og staffordshire terrier. Hetta eru hundar, ið eru vandir til at berjast, og teir hava eina ekstremt agressiva atferð.

– Hundarnir verða nýttir til hundabardagar. Tað gongur fyri seg á sama hátt sum hanabardagar. Hundarnir eru vandir at loypa á og berjast, og teir hava einki afturhald, greiðir Lars Mohr Nielsen frá.

Hann sigur, at aðrir hundar, sum fólk vanliga ræðast, t.d. Dobermann og Rottweilarar, ikki koma undir heitið kamphundar, og teir eru tí ikki bannaðir í Føroyum.

– Í Onglandi hava nøkur sakarmál verið, tí kamphundar hava lopið á fólk. Men eg minnist ikki at nakað sakarmál hevur verið í Norðurlondum í seinastuni. Men tað er eingin ivi um, at talan er um vandamiklar og ógvuliga agressivar hundar, vísir djóralæknin á.

Hann sigur, at taðserliga eru børn, ið verða álopin. Vaksin fólk duga ofta betur at meta um støðuna, tá hundar vísa agressiva atferð. Børnini hava minni møguleika at verja seg, og tí eru tey ofta offur.

### Ólógligir í DK eisini

Nevndu hundarnir eru eisini bannaðir í Danmark, men har er forboðslógin eins løtt at toyggja, sum føroyska lógin.

– Eg havi júst verið í Danmark, og eg haldi meg ikki hava sæð so nógvar kamphundar fyrr. Teir sóust allastaðni, hóast teir eru bannaðir. Fyri eini tíð síðani kom ein lóg, sum segði, at øll hundasløgini, sum eru bannað í Danmark, skuldu steriliserast. Men tað er allarhelst ikki gingið so væl við at hondhevja ta lógina, tí tað ýður í slíkum hundum nú, sigur Lars Mohr Nielsen.

Hann heldur tó ikki, at tað fer at vera nakar stórur trupulleiki av tílíkum hundum í Føroyum, tí tað eru sum ofast ávísar týpur, sum fáa sær slíkar hundar.

– Tað eru serliga rockarar, narkomanar og fólk, sum annars vilja verða respekterað, sum fáa sær slíkar hundar. Hesar týpurnar eru ikki nakar stórur samfelagsbólkur í Føroyum, og tí vænti eg ikki, at tað verður nakar stórur trupulleiki av hesum hundunum, hóast alt, sigur Lars Mohr Nielsen.

Spurdur hvat kundi verið gjørt fyri at forða vandamiklu hundunum at koma inn í landið, tá verandi lóg ikki er nóg góð, svarar hann, at tað er ilt at siga.

– Tað er sera torført at taka dagar ímillum hvørjir hundar eru ektaðir og hvørjir ikki eru. Og um stamtalva ikki fylgir við hundinum, so er næstan vónleyst at gera nakað. Eg veit ikki hvat kann gerast, fyri heilt at forða kamphundum í Føroyum, sigur Lars Mohr Nielsen at enda.

## Lógin

**§ 2.** Í hesi kunngerð merkir:
4) Kamphundur: hundur, sum er aldur og vandur til aggressiva atferð, íroknað t.d. Pitt bull terrier, Tosa og blendingar av hesum sløgum.

**§ 3. ...**
*Stk. 2.* Ikki er loyvt at flyta inn ella hava kamphundar.

*Stk. 2.* Dýraeigari skal síggja til, at eitt heilsuskjal sbr. § 2, 5. pkt., sum er undirskrivað av einum djóralækna og einum embætisdjóralækna í sendaralandinum, fylgir við innflutta dýrinum.
*Stk. 3.* Heilsuskjalið, nevnt er í stk. 2, skal hava hesar upplýsingar um dýraeigaran og innflutta dýrið:
1) navn, bústað og telefonnummar dýraeigarans í Føroyum og
2) slag, rasu, aldur og kyn á dýrinum og, er talan um hund ella kettu, eisini ID-nummar.

**§ 6.** Tá dýrið kemur til Føroya, skal dýraeigarin sjálvboðin vísa Heislufrøðiligu stavsstovuni ella tollmyndugleikanum heilsuskjalið.

*Stk. 2.* Er ivi um gildið á heilsuskjalinum ella um heilsustøðuna hjá dýrinum, ella vantar heilsuskjalið, skal Tolleftirlitið beinanvegin boða Heilsufrøðiligu starvsstovuni frá hesum.

Heilsufrøðiliga starvsstovan metir so um djórið, og hvat skal henda við tí.

# Hol í lógini

**Postboðini eru í sínum arbeiði ógvuliga útsett, tá tað kemur hundar, við tað, at tey noyðast inn á økið hjá fólki. Tað er tað ikki øllum hundum sum dáma. Fleiri postboð eru bitin, og postboðini eru tí millum heitastu forsprákarar fyri at herða lógina um hundar**

HUNDAR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Núverandi lóg, sum m.a. forbjóðar nøkrum vandamiklum, eiga postboðini sín greiða part í. Tey hava nevniliga í langa tíð víst á týdningin av eini slíkari lóg, og 7. apríl í fjør kom lógin so endiliga í gildi. Men longu nú vísir tað seg, at hon má strammast. Fólk hava neviliga alskyns hættir at snúgva seg uttanum lógina. Og postboðini vita, at ólogligir hundar eru innfluttir til Føroya.

### Hol í lógini

Heri Simonsen er álitismaður hjá postboðunum í Havn. Hann sigur, at trupulleikin við postboðum og hundum er ein klassiskur trupulleiki.

– Vit noyðast inn á økið hjá fólki í arbeiðnum, og tað eru tað ikki allir hundar, sum vilja finna seg í. Tí eru nógv postboð blivin bitin av hundi. Higartil er tó tíbetur eingin bitin av bannaðu hundunum, sigur Heri.

Men spurningurin er hvussu long tíð gongur, áðrenn tað verður. Postboðini vita nevniliga, at sonevndu dreparahundar eru innfluttir til Føroya. Tí hóast lógin er rættiliga greið, eru hol í henni.

– Fólk skjóta seg undir, at talan er um blandhundar ella at tey ikki hava nakra stamtalvu til hundin. Men er hundurin 75% Pitbull terriari og 25% okkurt annað, so er hann framvegis sera vandamikil. Summi fólk hava ein ektaðan hund, men tey siga seg einki prógv hava um, at hann er ektaður, tí tey ikki hava nakra stamtalvu, vísir Heri Simonsen á.



*Postboðini vita, at sonevndir dreparahundar eru innfluttir til Føroya. Tí hóast lógin er rættiliga greið, eru hol í henni. Heri Simonsen, postboð, harmast hetta*

Heri sigur, at tað við vandamiklu hundunum er akkurát øvugt av mannagongdini, tá fólk t.d. keypa sær íslandsross.

– Tá liggur stoltleikin í at kunna vísa eina flotta stamtalvu fram. Men við forbodnu hundunum liggur stoltleikin í ikki at hava nakra stamtalvu at vísa, tí so fæst hundurin inn í landið, hóast hann er forboðin, greiðir Heri Simonsen frá.

Heri sigur seg hava ein sera greiðan noktingarpolitikk, sum sigur, at um ein hundur er úttanfyri eini hús, so fer hann ikki inn við posti.

– So kunnu tey kalla meg øll tey ókvæmisorð, tey vilja. Men eg eri so heldur ongantíð blivin bitin, sum so nógv onnur postboð, greiðir Heri Simonsen frá.

### Óegnaðir hundaeigarar

Heri vísir á, at trupulleikin ikki bert liggur hjá postboðunum.

– Bæði vit og ruskmenninir noyðast dagliga inn á privata økið hjá fólki. Tískil eru vit kanska serliga útsett. Men um børn síggja ein hund inni á einum stykki, so fara tey ofta inn at klappa honum. Tí verða børn eisini sera ofta bitin. Og ganga hundarnir leysir, so eru øll í vandabólkinum, greiðir Heri frá.

Hann vísir tó á, at um hundar bíta inni á egnum stykki, so hendir einki, óansæð hvussu illa hundurin bítur.

– Tað vísir seg, at tað ofta skulu veruligar vanlukkur til, áðrenn nakað hendir. Men tá er tað altso ov seint, staðfestir Heri.

Hann sigur, at tað í dag eru nógv fólk, sum hava alt ov nógv at gera til at hava hund. Tey hava ikki stundir at taka sær nóg væl av honum, ganga túrar og tílíkt sum krevst.

– At tað eru so nógv fólk, sum ikki hava stundir til hundin, og sum tí bara tjóðra hundin uttanfyri, gongur útyvir tey, ið hava dagliga passagu inn til húsini, staðfestir Heri. Hann heldur fram og sigur, at tað hóast alt er munur á hundum.

– Fólk mugu gjarna hava colliehundar og puddlehundar fyri mær. Men tað er altso munur á hundum. At skula ganga framvið einum Colliehundi og einum Dobermanni ella Pittbull terriara kann ikki heilt samanlíknast, vísir Heri á.

Hann sigur seg mæla til, at lógin verður broytt soleiðis, at bert vaktarverk og t.d. sløkkilið fáa loyvi at hava tílíkar hundar. Ikki privat fólk.